# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*29. januar fingu John og Rósa Syderbø, Aalborg, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3910 g.*



*15. februar fekk Róar ein lítlabeiggja. Foreldrini eru Birita Andreasen og Bárður H. Joensen, Brabrand. Hann vigaði 4010 g, og var 54 cm langur.*

4. februar fingu Daniella og Bergur Debes, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4100 gr.

17. februar fingu Beinta Lundsbjerg og Marcin Maciej Dudkiewicz, Leirvík, ein son. Hann var 54 cm long og vigaði 3200 gr.

17. februar fingu Súnbjørt Christiansen, Tórshavn, og Jóhan Hentze, Skúvoy, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4300 gr.

17. februar fingu Oddvá og Mortan Hansen, Glyvrum, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4050 gr.

18. februar fingu Ann Mari og Patrick Nolan, Skipanesi, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3350 gr.

18. februar fingu Nancy og Kári Kallsberg, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 58 cm long og vigaði 3820 gr.

20. februar fingu Inger og Johan Simonsen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4050 gr.

21. februar fingu Lis og Poul Dávur Hammer, Oyrareingjum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4400 gr.

21. februar fingu Vagn og Anja í Geil, Argjum, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3500 gr.

## Mnningarorð um mín elskaða abba

# Eivind Eliasen,

## føddur 12.09.1927, deyður 08.07.04



Ringt er at koma norður til Mikladals og vita, at tað manglar ein persónur, sum vit ikki skulu síggja meira.

Abbi, eg dugi ikki at ímynda mær, at tú ikki ert ímillum okkum meira.

Abbi var sum ein pápi fyri okkum systkini. Altíð var hann fúsur at gera skúlating saman við mær og Ellkin, tá ið vit gingu í skúla.

Abbi róði nógv út, og tí var tað altíð abba, vit spurdu um líkindi, tá ið vit skuldu yvirum fjørðin.

Jú, abbi var altíð fúsur at hjálpa. Í ódn og í logn var hann uppi í Heygum og gav kríatúrunum hjá Eyðuni mamba.

Eg minist, tá ið ódn var í 1988, og mamma var einsamøll við okkum systkjunum, at úthurðin hjá okkum fór. Mamma fekk bara stundir at ringja oman til abba og siga, at úthurðin var farin. Og so mistu vit telefonina!

Abbi var skjótur niðan og saman við abbabeiggja og Markus fingu teir neglt eina plátu uppfyri.

Ta náttina var hann uppi hjá okkum, til tað ringasta var hasað av.

Eg minnist eisini um heystarnar, at abbi og Eyðun flettu seyð í kjallaranum hjá ommmu og abba.

Abbi var altíð í sving við okkurt. Var tað ikki at passa kríatúr hjá mamba, so var tað at sláa kirkjugarðin ella at sláa niðri við Brúgvarnar, sum var eitt tað seinasta, hann gjørdi, áðrenn hann fór heim til Harran.

Eg minnist væl, tá ið vit saman við abba vóru uppi í Dalinum og hentaðu ber. Tað vóru frálíkir túrar, vit høvdu saman við honum.

Abbi var ofta eisini úti í berginum og fleygaði fugl, og tann eina dagin, hann var farin at fleyga havhest, var tað blivið nakað seint. Omma sendi tá babba út at vita, um alt var í lagi.

Tá sat abbi har úti og skrædlaði havhest. Hann hevði fingið umleið 300!

Nú vit hava mist okkara abba, er sorgin stór. Men vit mugu royna at koma viðari. Men tað er hart, og tí fer mín samkensla til tín, góða omma, nú tú hevur mist tann, tú elskaði mest. Somuleiðs sendi eg mína heilsu til tykkum - mammu, Eyðun og Magnus. Tit, sum hava mist tykkara pápa, hann sum stóð tykkum so nær. Og somuleiðis til míni systkin, sum hava mist tann besta abban og langabban í verðini.

Abbi var nógv avhildin; tað sást á tí stóra skaranum, sum fylgdi honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Abbi, eg sakni teg ótrúliga nógv. Takk fyri alt, tú hevur verið fyri meg.

Til seinast vil eg enda við hesum ørindi, sum abbi lærdi meg:

Tað er so gott at kenna Guð
Frá ungum árum av
At veksa, tæna honum alt
sum okkum lívið gav.

Við hesum orðum vil eg lýsa frið yvir minnið um mín elskaða abba.
Hvíl í friði, elskaði abbi.

**Abbadóttir tín, Anita**

## Andlát

15. februar
Louise Serubabelsen, móðir Kristine Kjær, Vágur, 75 ár.
Hjørleif Frederiksen, Norðdepli, 66 ár.

16. februar
Signhild Johannesen, Klaksvík, ættað úr Miðvági, vanliga nevnd, Signhild á Hædd, 89 ár.
Andrew Godtfred úr Vági, bús. í Havn, 91 ár.

17. februar
Asger Leyni, í Ålborg, sonur Sonny Leyni, 42 ár.

18. februar
Hans Sejer Djurhuus úr Hósvík, 66 ár.
Álvur Hansen, ættaður úr Svínoy, bús. í Havn, 57 ár

19. februar
Ester Hentze í Hvalba, 80 ár.
Hervør Nolsøe, fødd Joensen, ættað úr Miðvági, 71 ár.
Ólavur av Váli, Tórshavn, 49 ár.
Margit Dam, Húsavík, 90 ár.
Ester Hentze í Hvalba, 80 ár.

20. februar
Hedvig Kjærbo Sønsteli, 85 ár.

21. februar
Thea Mathilda Hansen, Leirvík, 86 ár.
Mariann Joensen, ættað av Skála, búsitandi í Brønshøj, 33 ár.

22. februar
Daniella Hansen, fødd Niclasen, av Tvøroyri, búsitandi í Keypmannahavn, 77 ár.

23. februar
Karton Joensen, Tvøroyri, 68 ár.

### 100 ára føðingardagur

Sunnudagin 27. februar fyllir Karl Jacob Sigvardsen frá Gjógv, búsitandi á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, 100 ár.

Føðingardagurin verður hildin norðuri við Gjógv.

Byrjað verður við kirkjugongd klokkan 12.00.

Klokkan 13.30 bjóðar kommunan øllum, sum ynskja at heilsa upp á Karl Jacob, til døgurða í Gjáar Samkomuhúsi.

Aftan á verður farið til kaffi á Gjáargarði, har øll eru hjartaliga vælkomin. Hildið verður á til klokkan 17.00.

### 80 ára føðingardagur

Mánadagin 28. februar fyllir Brynjálvur Djurhuus, Tórshavn, 80 ár.

Hann verður burturstaddur.

### Gullbrúdleyp

Leygardagin 26. februar hava Johild og Niels Durhuus, Vestmanna, gullbrúdleyp.

Dagurin verður hildin saman við børnunum og ommu- og abbabørnunum.

### Gullbrúdleyp og silvurbrúdleyp

Sunnudagin 27. februar hava hjúnini Anni og Valdemar Midjord, Runavík, gullbrúdleyp, og Jóngerð og Niels Midjord, Klaksvík, silvurbrúdleyp.

Tey eru burturstødd.

### Prógv

Kári Holgarsson, Vestmanna, hevur 3. februar lokið prógv sum civilverkfrøðingur á DTU í Lyngby.